# TÆNASTUR Á SJÓGVI OG LANDI



# HAVNATÆNASTUR

ISO 9001:2008 BUREAU VERITAS Certification

Maritime Labour Convention (MLC), 2006

Achilles JQS Qualified

FMS FAROE MARITIME SERVICES









# HAVNATÆNASTUR kring Føroyar

Faroe Maritime Services hevur drúgvar royndir sum veitari av fólki til ymisk arbeiðspláss á sjógvi og landi. Við hesum royndum hava vit frá byrjan flutt okkum langt framá, so vit í dag, uttan at siga ov nógv, kunnu bjóða fram tænastur, sum eru fult út kappingarførar við øll onnur feløg, sum starvast í somu vinnu.

Vit hava egið lossingarfólk, kranførarar, trukkførarar o.fl. og kunnu við stuttum skoðbrá veita fólk til eitt nú havnaøki, goymslur og skip, sum hava grunnleggjandi vitan og myndugleika-kravdan førleika til at handfara vøru og útgerð á slíkan hátt, at serlig atlit í hvørjum føri verða tikin til trygd, heilsu, umhvørvi og góðsku.

Tænastur okkara fevna um alt frá smærri einkultmans-uppgávum frá privatum viðskiftafólki og til heil arbeiðs-toymi til eitt nú lossingar-flutningsuppgávur og aðrar størri uppgávur, har tørvur er á einum toymi, sum hevur neyðugar dygdir og førleikar til at útinna uppgávurnar á tryggan hátt.

Næsta síða vísir eitt yvirlit yvir samlaðu tænastur okkara.

Um tit hava fyrispurning um eitthvørt, so haldið tykkum ikki aftur at seta tykkum í samband við okkum á: tlf 610000. Vakttelefon: 792003.

Nevnast kann, at FMS í 2013 hevði yvir 300 fólk í arbeiði innan fylgjandi øki kring alt landið:

- Arbeiðsfólk
- Lossingarfólk
- Kranaførarar
- Trukkførarar
- Reingerðarfólk
- Viðlíkahaldsfólk
- Smiðir
- Kavarar
- Vaktarfólk
- Flutningsfólk
- Goymslufólk
- Alarar á sjogvi og landi
- Sjófólk
- Annað



# FMS - ALTJÓÐA VEITARI

Faroe Maritime Services er veitari av fylgjandi tænastum, sum allar lúka tey krøv, sum eru ásett í altjóða góðskustýrings norminum ISO 9001:2008 og MLC 2006 semjuni. FMS gjørdist í 2013 AchillesJQS góðkent.

- Skiparakstur vegna triðja part
- Tekniskur rakstur vegna triðja part
- Góðskustýring, herundir ISM, ISPS og MLC
- Rakstur av manning, lønarbókhald, sertifisering vm
- Keyp-, søla og útleiging av skipum
- Havnatænastur

Í Faroe Maritime Services eru kundanøgdsemi og dygd aðalmál, sum vit støðugt royna at betra og optimera gjøgnum eftirmetingar, mannagongdir og effektiviseringar.

Ábyrgd, dygdargóðska og nýskapan eru kjarnan í tí, vit veita øllum viðskiftafólki okkara við serligum atliti til heilsu og trygd av starvsfólki okkara og verju av umhvørvi sum heild.

Sí meira kunning um veitingar okkara á www.fms.fo

Faroe Maritime Services hevur yrkisgóðkend fólk, sum lúka altjóða krøv fyri góðskutrygd til at átaka sær arbeiði á sjógvi og landi kring allan heimin.

Um tit hava fyrispurning um eitthvørt, so haldið tykkum ikki aftur at seta tykkum í samband við okkum á: tlf 610000. Vakttelefon okkara er: 792003.